Føroyingar eiga avger›ina

– Ta› eru føroyingar einsamallir, sum gera av, um teir ynska einar sjálvstø›ugar Føroyar ella ikki. Hendan rættin hava vit onga ætlan um at pilka vi› frá danskari sí›u, sigur danski forsætisrá›arrin í sambandi vi› kjaki› um sjálvsavger›arrætt føroyinga

FULLVELDIS-SAMRÁ‹INGAR

John Johannesen og Magnus Dam Keypmannahavn

Or›adrátturin millum danska forsætisrá›harran og landsst‡ri› seinastu dagarnar fer uttan iva at seta sín dám á samrá›ingarfundin, sum ver›ur settur í forsætisrá›num klokkan 14 seinnapartin.

Or› sum sjálvsager›arrættur, tjó›, "sjálvstø›ugt fólkarættarligt subjekt" og onnur or›, sum hoyra heima í lógbókunum fara at ver›a vend og snara›, til partarnir einafer› eru lidnir vi› samrá›ingarfundin og eftir ætlan fara á felags tí›indafund.

Landsst‡ri› hevur á›renn samrá›ingarnar sagt, at Poul Nyrup Rasmussen má svara greitt uppá, um hann vir›ir rættin hjá føroyingar at avgera sína egna lagnu.

Poul Nyrup Rasmussen hevur alla tí›ina sagt, at ta› ver›a føroyingar sjálvir, sum á einari fólkaatkvø›u gera av, um vit skulu hava fullveldi ella ikki. Og tá i› Sosialurin spurdi hann nærri um hesi vi›urskifti í gjár, var hann eins avgjørdur og hann altí› hevur veri›.

– Einki er broytt frá mínari sí›u. Sjálvsavger›arrætturin liggur hjá føroyingum, sta›festi hann. Hann heldur kortini, at ta› er stórur munur á tí, sum ver›ur rópt eitt "sjálvstø›ugt fólkarættarligt subjekt" og so ta›, at eitt fólk hevur sjálvsavger›arætt.

– Fólkarættarliga er ta› solei›is, at Føroyar eru eitt "sjálvstø›ugt fólkarættarligt subjekt" í tí løtu, at Føroyar eru ein suverenur statur. Vit hava alla tí›ina sagt, at fullveldissamrá›ingarnar ikki í sjálvum sær merkja, at vit vi›urkenna Føroyar sum ein suverenan stat. Hetta er rættiliga grundleggjandi. Men ta› broytir kortini ikki ta› sannroynd, at ta› er føroyska fólki› sjálvt, sum avger›, um ta› vil hava Føroyar at ver›a ein suverenan stat. Stórur munur er á hesum bá›um hugtøkunum, og eg haldi, at ta› er skeivt at tvinna tey saman, sigur Poul Nyrup Rasmussen.

Fleiri samgongupolitikkarar hava ákært donsku stjórnina fyri at vilja draga samrá›ingarnar út. Men hetta hevur Poul Nyrup Rasmussen ongar ætlanir um.

– Eg fái nógvar ákoyringar á vegnum. Men eg kann lova tykkum, at eg, eins og løgma›ur, ynski at gera so stór framstig sum gjørligt. Men eg síggi ta› sum mína uppgávu at syrgja fyri, at øll vi›urskifti ver›a gjølla vi›gjørd, so bæ›i føroyingar og danir vita nágreiniliga, hvørjar skyldur og rættindi hvør teirra hevur, tá i› samrá›ingarnar eru lidnar.

– Vit eru komin naka› ávegis, men enn er langt eftir á mál. Nógv stór umrá›i eru eftir at frá grei›u á, og eg havi einki ímóti, at vit á fundinum í morgin gera stø›una upp, so vit síggja hvat nú restar í.

Poul Nyrup Rasmussen roknar tískil vi›, at ta› mugu vera fleiri fundir afturat millum landsst‡ri› og stjórnina, á›renn máli› er rokki›. Og harafturat heldur forsætisráharrin, at ta› skulu vera fleiri fundir afturat millum teir einstøku rá›harrarnar eins og fundurin mánadagin millum Frank Jensen og Høgna Hoydal.

Heldur tøvandi leg›i forsætisrá›harrin afturat, at hann samstundis heldur, at landsst‡ri› eigur at umhugsa, um partarnir skulu halda fram eftir sama leisti ella um samrá›ingargrundarlagi› skal broytast.

– Fyrr ella seinni mugu vit gera búgvi› upp og velja, hvat vit skulu gera. Skulu vit halda fram ella skulu vit royna okkurt anna›, sigur forsætisrá›harrin. Um hann heldur, at tann tí›in er komin nú ella ikki, vil forsætisrá›harrin ikki svara uppá.

– Eg vil ikki kroysta mótpartin til at taka eina avger›, sum hann ikki er til rei›ar at taka.

Poul Nyrup, forsætisrá›harri sigur vi› Sosialin, at rættin hjá føroyingum at avgera um teir vilja vera ein sjálvstø›ug tjó› ella ikki, vil stjórnin ikki pilka vi›. Mynd: John Johannesen

Krevur frágrei›ing frá Nyrup

Jóannes Eidesgaard fer í dag at krevja at fáa at via frá danska forsætisrá›harranum , hvat hann meinar vi› , tá hann sigur, at Danmark ikki gó›tekur Føroyar sum fólkarættarligt subjekt

FULLVELDIS-SAMRÁ‹INGAR

Magnus Dam og John Johannessen Keypmannahavn

Jóannes Eidesgaard fer í dag á fund í 21 mannanevndini hjá fólkatinginum, sum fylgir samrá›ingunum.

Á hesum fundinum fer Jóannes Eidesgaard at krevja at fáa at vita frá danska forsætisrá›harranum, hvat hann meinar vi›, tá hann í brævi til løgmans sigur, at ta›, at Danmark er fari› undir fullveldissamrá›ingar vi› Føroyar, ikki merkir, at Danmark gó›tekur Føroyar sum eitt fólkarættarligt subjekt.

– Eg havi enn ikki fingi› nakra løgfrø›isliga meting av útsøgnini hjá Nyrup, men meinar hann, at Danmark ikki gó›tekur Føroyar sum tjó›, so eri eg rúkandi ósamdur vi› honum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›urin í Javna›arflokkinum, sum eisini er fólkatingslimur, vísir á, at Føroyar eru tjó›, og at hetta ikki er ney›ugt at sta›festa vi› at fáa eina frágrei›ing frá íslendskum serfrø›ingi í altjó›arætti.

– Vit eru ein tjó›, men tó hava vit heimast‡rislógina vi› hennara avmarkingum, og ta› er hana vit skulu broyta. Men hetta hevur Tjó›veldisflokkurin ofta hug at gloyma. Talan er jú um eina lóg, sum er samtykt bæ›i av fólkatinginum og av løgtinginum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men Jóannes Eidesgaard vil kortini hava at vita frá danska forsætisrá›harranum, um hann vir›ir føroyska fólki› sum eina serstaka tjó›, og tí fer hann á fundinum, sum ver›ur klokkan tvey seinnapartin í dag, at seta forsætisrá›harranum fyrispuring um hetta. Møguliga ver›ur talan um ein felags fyrispurning, i› Jóannes Eidesgaard og hin føroyski fólkatingslimurin, Óli Breckmann, fara at seta saman.

Óli Breckmann er í skrivandi løtu vi› flogfari á veg til Keypmannahavnar, og tí hevur ta› ikki eydast okkum at fáa at vi›merking frá honum.

Ikki á fund vi › uttanlandsnevndina

Ta› er ikki bert 21 mannanevndin hjá fólkatinginum, i› hevur bo›a› frá fundi í Keypmannahavn undan samrá›ingunum. Forma›urin í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, Hergreir Nielsen, hevur eisini bo›a› limum sínum frá, at uttanlandsnevndin heldur fund í Keypmannahavn me›an samrá›ingarnar um fullveldi eru.

Men Jóannes Eidesgaard ætlar sær ikki at vera vi› á fundi hjá uttanlandsnevndini í Keypmannahavn.

– Eg fari heim aftur til Føroya á›renn fundin, tí eg haldi ikki, at ta› er rætt, at uttanlandsnevndin er vi› landsst‡rinum til samrá›ingar. Hetta er ta› sama sum, at vinnunevndin fór til fiskivinnnusamrá›ingar saman vi› landsst‡rismanninum í fiskivinnumálum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at landsst‡ri› hevur fingi› mandat at samrá›ast frá tinginum, og tí eigur landsst‡ri› sjálvt at klára samrá›ingarnar, uttan leypandi samband vi› uttanlandsnevndina me›an samrá›ingarnar eru.

Kortini sta›festir Jóannes Eidesgaard, at ta› er ney›ugt, at uttanlandsnevndin ver›ur kunna› um samrá›ingarnar. Men hetta, heldur hann, eigur at ver›a gjørt, tá landsst‡ri› kemur heim aftur til Føroya eftir samrá›ingarnar.